## Viðmerking:

# Umboðsmaðurin

*Ein tøkk til Jenis av Rana og Løgtingið*



Føroya Løgting samtykti í farnu viku við 32 atkvøðum fyri og ongari ímóti at seta á stovn Løgtingsins umboðsmann.

At lógin varð samtykt av einum samdum løgtingi ber boð um, at væl er arbeitt frá øllum síðum. Ikki minst hevur uppskotsstillarin gjørt eitt vælaverk. 14. desembur í fjør legði Jenis av Rana vegna Miðflokkin uppskotið fram, og fekk tað beinanvegin góða móttøku av tinginum. Tað varð beint í eina serliga nevnd, sum samd legði uppskotið aftur fyri tingið. Og í farnu viku varð tað einmælt samtykt.

**Trygd borgarans**
Eitt hjartamál hja Miðflokkinum er rokkið. Til seinasta val lovaðu vit at virka fyri at **sambandið millum tað almenna/umsiting landsins og einstaka borgaran skal betrast, so lættari og skjótari kann komast fram í almennu umsitingini.** Uppgáva umboðsmansins verður m.a. júst hendan

- At vera ein trygd fyri vanliga borgaran móti avgerðum, hesin metir órættvísar, tilvildarligar ella kanska beinleiðis skeivar
- At vera ein trygd fyri vanliga borgaran móti mistøkum, vansketni ella vanrøkt av skyldum í almennu umsitingini.

Tað er greitt, at almenn umsiting er ein forlongdur armur hjá løgtinginum at útinna tær tænastur, sum Løgtingið áleggur, og tí hevur Løgtingið áhuga í, at hesar tænastur verða røktar til lítar. Umboðsmaðurin er almenna umboð løgtingsins at hava eitt vakið eyga við hesi umsiting, so vanligi borgarin ikki verður fyri órætti.

Tey eru ivaleyst ikki so fá, sum hava kensluna av órættari viðferð í almennu skipanini. Mangan er vónleyst at koma ígjøgnum við sínum sjónarmiðum og mótmælum, tá tvístøður koma upp. Mong eru tey, sum í tolni heldur lata sær lynda at verða meir ella minni trumlað niður fyri frið skuld. Tað eru bert tey fáu, sum hava tíð, orku og fíggjarligan førleika at muta ímóti fyri síðani at skula bíða í mánaðir og ár eftir avgerðum frá skuggapersónum í almennu umsitingini. Umboðsmaðurin hevur ikki verið, og tí hevur so at siga alt borið til. Tað verður ikki so lítið at ríva í hjá umboðsmanninum.

**Stutt og lætt**
Dentur verður í uppskotinum lagdur á, at vegurin til borð umboðsmansins skal vera **stuttur og lættur hjá tí einstaka borgaranum;** hetta eru heilt nýggir tónar, tá um almennar kærur ræður. Vanliga er vegurin langur og tungur. Væntast kann, at nýggjar og meiri borgaravinarligar siðvenjur fara at taka seg upp, og er tað at fegnast um.

**Serdømi í føroyskum politikki**
Tað má sigast vera serdømi í føroyskum politikki, at eitt uppskot frá andstøðuflokki við bert einum tingmanni vinnur frama og fær so holla undirtøku á Føroya Løgtingi. Tøkk fái Jenis av Rana fyri uppskotið og tøkk fái Føroya Løgting fyri undirtøkuna.

**Bill Justinussen**
**Skrivari Miðfloksins**

Lesið eisini Sosialin á Internetinum
www.sosialurin.fo

REPROZ
GRAFISKAR LOYSNIR
Tel +298 31 95 40
Fax +298 31 75 41
Alt innan prentlutir
Mail: jakzac@post.olivant.fo

# At spæla fullveldi – serstøk tjóð

Veljarakanningin aftan á fyrsta samráðingarumfarið hin 17. mars verður av sambandsfólki tulkað soleiðis, at landsstýrið hevur mist sín stuðul til politisku stevnu sína. Kortini man vera ivasamt, um henda útlegging er bein. Men um so skuldi verið, so má ætlanin hjá einum meiriluta av føroyska fólkinum vera tann, at vit framhaldandi skulu spæla at vera »serstøk tjóð« t.d. á grækarismessu, flaggdagin og á ólavsøku sjálvandi, ið summi enntá kalla tjóðarhátíð okkara. Um so er, man hetta vera einasta tjóðarhátíð uttan tjóð. Slíkt kann so einans bera til í Føroyum. Aðrastaðni í heiminum letur slíkt gykl seg ikki fremja. Bert tí at Poul Nyrup Rasmussen garteraði eitt sindur hin minniliga fríggjadagin 17. mars, har hann hótti føroyingar við einari stuttari skiftistíð, júst so sum Sambandsflokkurin og sambandsvongurin í Javnaðarflokkinum hava spátt seinastu tvey árini, so tustu sjálvstýrisfólk yvir í Sambandsflokkin sambært veljarakanningini. Hvussu ber hetta til?

Hvar er hin tiltikni sterki »ryggur« okkara?

**Skeivur hugburður**
Tá danskir politikarar síggja henda hugburðin, so er tað ikki undranarvert, at teir hava lítla virðing fyri okkum føroyingum. Hetta vístu teir eisini sera týðiliga í 1992 og aftur nú, átta ár seinni í hesum árinum. Fyrru ferðina mótvegis einum javnaðarløgmanni, og seinnu ferðina var tað fólkafloksløgmaður, ið mátti taka skoluna. So tað tykist, sum um politiski liturin er týdningarleysur, men við okkara undirbrotliga atburði mótvegis dønum má hetta gerast úrslitið. Í heyst verður tað helst soleiðis, at vit fáa møguleika at taka ábyrgdina av okkum sjálvum, men tað fer eisini at bera til at lima okkum inn í ríkið (grundlógina), um sambandsflokkarnir saman við donsku politikarunum fáa vilja sín. Afturfyri fáa vit so eina sera lagaliga skipan við Danmørkina, alt eftir hvussu stórt yvirskipað vald danir fáa á okkum.

Gera vit hetta, so hevur Sambandið saman við donsku politikarunum vunnið ein avgerandi sigur, og fer eitt slíkt úrslit at seta okkum í eitt sera ørkymlandi ljós mótvegis grannum okkara og altjóða samfelagnum í síni heild. Hvat vilja hasir føroyingarnir, verður spurt, og tað av røttum. Donsku politikararnir kunnu so seinni og við heilt stórum rætti tvíhalda um, at fólkið sjálvt hevur limað seg inn undir donsku grundlógina við fólkaatkvøðuni, og tað hava vit ikki gjørt áður í søguni.

**Sjálvstýri/heimastýri – miðfirrað stýrisskipan**
Heimastýri er ikki annað enn ein skipan, har evsta valdið, sum er fólkatingið, hevur lagt ávísar uppgávur til eitt landspartating, ið nevnist løgtingið. Løgtingið hevur til dømis fingið til uppgávu at krevja skatt inn fyri donsku stjórnina. Um upphæddin er ov lítil til raksturin, so letur danska stjórnin eitt ískoyti, ið nú verður nevnt blokkstuðul.

Løgtingið hevur fingið nógvar aðrar uppgávur at røkja fyri donsku stjórnina og fólkatingið, og afturfyri hetta fær løgtingið blokkin. Nyrup og aðrir danskir politikarar hava sjálvir sagt alment, at soleiðis skilja teir støðuna. Blokkurin er løn fyri at røkja danskar uppgávur í Føroyum.

Danir kundu saktans gjørt somu skipan fyri donsku landspartarnar, og tað hevði ikki broytt Danmark sum eindarríki. Heldur ikki, hóast teir høvdu hvørt sítt landspartaflagg. Sostatt fyrigykla vit føroyingar okkum, at »sjálvstýri« er »næstan fullveldi«, men tað er so langt frá. Henda støðan passar sjálvandi donsku politikarunum sera væl.

**Nógv vilja hava fullveldi – men ikki enn**
Kortini verður sagt, at búskaparliga frælsið má koma fyrst. – Her eru donsku politikararnir ikki samdir við sambandsfólk í Føroyum. Stutt síðani segði Uffe Ellemann-Jensen, at politiska frælsið má koma fyrst (baltisku londini). Sama segði A. P. Møller fyri stuttum, so her ruggar alt ikki rætt.

**Nær skulu vit so hava fullveldi?**
Skal tað vera, tá 10 metra breiður vegur er komin í hvørja bygd og hvønn hagapart í landinum, tá øll trý sjúkrahúsini eru gjørd av nýggjum frá niðast til ovast? Tá undirsjóvarberghol eru komin í hvørja oyggj? Tá einir fimm flogvallir eru komnir ymsastaðni í landinum? Tá fíggjarliga framtíðin hjá hvørjum einasta føroyingi er tryggjað tey næstu 50 árini? Ella hvussu leingi skulu vit taka stig fyri stig afturat? Tað hava vit gjørt í 96 ár – síðan 1906 í veruleikanum.

Alt hetta eru sjálvandi bert undanførslur til tess at sleppa undan at taka støðu til spurningin, og undanførslurnar frá sambandsfólki eru endaleysar. Gull og grønar skógir

Eingin kann lova glæsiliga framtíð í mong ár fram, hvørki samband ella fullveldi kunnu, og tað er eingin ivi um, at vit væl kunnu klára okkum, um vit bert vilja, tí her býr ágrýtið og dugnaligt fólk, ið ferð eftir ferð hevur dugað at umstilla seg til broyttar umstøður, og hví altíð spáa um tað ringasta. Tá hevur mangan verið gjørt, men so hevur lýst í, og tað, sum vit stúrdu mest fyri, gjørdist ein fyrimunur.



Ein kann so spyrja, hví danskir politikarar eru so trekir at sleppa Føroyum. Orsøkirnar eru nógv: Ein er so tann, at teir vilja styrkja støðuna hjá andstøðuni í Føroyum. Føroyska økið við havið er størri enn Danmark við sínum havi, verður sagt í loftmiðlunum, og við evsta valdinum yvir Føroyum ber til at føra ein sovorðnan politikk, at munandi partur av møguligum oljupeningi endar í Keypmannahavn. Um NATO aftur fer at seta krøv til donsku stjórnina, ber til at nýta Føroyar og Grønlands sum »kort« í hesum spælinum, so Danmark sjálvt sleppur undan politiskari kreppu, av tí at vinstrakreftirnar í Danmark vilja ikki finna seg í, at teirra land verður gjørt til bumbumál í NATO-samanhangi.

Donsku politikararnir fáa seravtalur við ES, av tí at teir kunnu vísa á, at teir hava uppgávur at røkja í Grønlandi og í Føroyum vegna ES, so hesi økini ikki gerast ótrygg politiskt á onkran hátt.

Kemur altjóða spenningur aftur, og tað kann væl henda, so hevur Danmark eina lyklastøðu gjøgnum Føroyar og Danmark, ið røkka nærum tvørtur um alt Atlantshavið. Hetta eru sjálvandi metingar, men tær eru als ikki ósannlíkar.

**Óttin fyri at taka evsta vald í landinum**
Tað er óskiljandi, at so mong eru bangin fyri at taka evstu ábyrgdina av okkara landi. Spyrt tú aðrar tjóðir, um tær kundu hugsað sær at selt evsta valdið fyri ein blokkstuðul úr øðrum landi, so verður í besta føri flent at spurninginum. Nei, góðu føroyingar, nú mugu vit standa saman og vísa, hvat vit duga til. Um nøkur ár fer eingin at skilja, hví vit vóru so ivasom.

Vit ivaðust, tá føroyskt mál skuldi inn í skúlan í 20- og 30-árunum, vit ivaðust sera nógv um flaggið, vit ivaðust í ólukkumát, tá úrslitið av fólkaatkvøðuni var greitt í 1946, vit ivaðust um føroyskt kirkjumál í eini 30 ár, vit ivaðust um sjómarkið o.s.fr. Nú er tað eingin, ið ivast um hesi stórmál longur. Øll eru fegin um, at vit tóku okkum um reiggj í hesum sjálvsøgdu avbjóðingum.

**Samráðingarnar 2. mai í Keypmannahavn**
Hesar samráðingar hava víst, at tað ber til at fáa skilagóðar avtalur við Danmark um føroyskt fullveldi og allar teir spurningar, ið hetta inniheldur av mongum málum. Enn er fíggjarligi parturin ikki komin upp á pláss, og tað er ikki lættari hjá føroysku samráðingarnevndini, tá støðan er tann, at teir skulu »berjast« á tveimum hermótum. Í

Danmark stríðast teir við donsku politikararnar um argument, og afturkomnir til Føroya noyðast teir at taka sama stríðið upp við føroysku andstøðuna, ið stórt sæð er samd við

**Nyrup og hansara fólk**
Av sonnum ein merkisverd og trupul støða, so tað er einki at siga til, at onkur hevur hug at slaka fyri hesum ovurstýra trýsti frá tveimum nærum samdum síðum.

Men gott í tykkum! Haldið fast um stevnuna uttan at himprast. Søgan fer skjótt at vísa, at tit høvdu rætt.

Góða eydnu hin 15. juni!

**Asbjørn Lómaklett**

## Svenning aftur formaður í Sinnisbata

Á aðalfundinum hjá Sinnisbata, ið var 15. apríl, varð nevnd vald, sum hevur skipað seg soleiðis: Svenning av Lofti, formaður, Margretha Poulsen, næstformaður, Arnfinn Poulsen, kassameistari, Tummas Thomasen, skrivari, Ásla Svensson, nevndarlimur, Maria Andersen, eykalimur, og Sólbjørg Petersen, eykalimur.

Úr nevndini fór Sólbjørg Zachariasen, fyri hana kom Sólbjørg Petersen.

# Yngd

Nr. 17 2000 SOSIALURIN

sí›a 13

## Ársins Songrødd enn eina ferð



s. 14 & 15

## Heima í tveir mánaðir og hvat so?



Elsa Maria Simonsen



Leivur Vitalis



Daisy Eltør



John Mortensen

sí›a 16
Bjørk dansar í myrkrinum

sí›a 17
Hitlistar og svara so!

baksí›an
Fløguumæli